# Heiðursbræv

## Mentanarvirðisløn landsins 2024

verður latin

## *Hanna Bjartalíð*

myndlistamanni

Hanni Bjartalíð (f. 1968) er myndlistamaður úr Klaksvík, ið hevur nomið sær útbúgving í Kokkola í Finlandi.

Listin hjá Hanna hevur altíð verið serstøk og brotið upp úr nýggjum í føroyskum høpi. Bæði í sínum málariska og skulpturella úttrykki er Hanni Bjartalíð sín egin. Frá serstøkum illustrativum málningum á ungum árum, til djúpar materiellar flatur seinni á listaleiðini. Hansara skulpturellu verk og relieffir eru framleidd úr funnum og endurnýttum træi, nágreiniliga koloristiskt málað og telgd.

Verk hansara lýsa eina naivistiskt heimliga og humoristiska nostalgi og melankoli. List hansara er skemtingarsom, eyðkennilig fyri okkum øll og setur spurningar um lív og deyða á breddan.

Stóra træklótan, sum listprýðir atrium á Glasi, telist millum høvuðsverk hansara.

List hansara kann stundum síggjast sum ein nýtulking av gamlari altjóða myndlistaligari siðvenju, men Hanni Bjartalíð hevur givið sítt heilt egna og sterka íkast til føroyska myndlist.

Hanni Bjartalíð hevur luttikið í eini ørgrynnu av solo- og bólkaframsýningum í Føroyum, Danmark, Finlandi og Týsklandi og luttók á kendu Liverpool Biennaluni í 2012.

Fyri listaligu avrik síni fær Hanni Bjartalíð Mentanarvirðisløn landsins 2024.

Sirið Stenberg, landsstýriskvinna
23. oktober 2024